*Heimsins størsta fyritøka setir kós móti Føroyum:*

# Oljugigantarnir SHELL og BP fara undir samstarv á føroyska økinum

*Leiðandi fólk í tveimum av heimsins størstu og mætastu fyritøkum, tí hálendsk-bretska SHELL og tí bretska BP, hava júst verið í Føroyum og greitt frá, at oljufyritøkurnar báðar ætla at samstarva í leitingini eftir olju og gassi á føroyskum øki.*

Jan Müller

Tað er ikki hvønndagshending, at oddamenn í heimsins størstu vinnulívsfyritøku - SHELL - vitja í Føroyum. Hetta hendi so í farnu viku - og bendir vitjanin á, at henda størsta oljufyritøkan í heiminum av álvara er farin at vísa føroysku undirgrundini stórri ans og vil vera við í leitingini eftir olju og gassi her.

Tey bæði Shellumboðini, P.A.C. de Ruiter, kanningarstjóri og Peter Osborne, leiðari fyri arbeiðinum á Atlantsmótinum, komu til Føroya saman við tveimum BP fólkum, Tom Fife, sum sendur á odda fyri kanningunum vestan fyri Hetland og við Føroyar, og Crawford Gordon, sum er ovasti pressutalsmaður hjá fyritøkuni.

BP, sum longu er rættuliga virkið á føroyskum øki, hevur fleiri ferðir vitjað her áður, men hetta er so fyrstu ferð, at so týðandi umboð fyri Shell hava vitjað.

Endamálið við vitjanini var at greiða oljumyndugleikunum frá tí óformliga samstarvi, sum tey bæði feløgini hava á føroyskum øki. Shellfólkini ætlaðu eisini at hitta løgmann, sum umsitur oljumál, men flogferðin til Føroya gjørdist drúgvari enn ætlað og tí var vitjanin í Tinganesi avlýst.

Teir báðir Shellmenninir hava høvuðsábyrgdina av kanningunum í øllum tí bretska økinum, sum nú er víðkað til at fevna um føroyska og írska økið eisini.

**Trý øki í eini heild**

Her er talan um hellingina á Atlantsmótinum, sum so nógv hevur verið tosað um í seinastuni.

-Vit meta best trý økini sum eina heild, har kanningar og upplýsingar úr einum øki kunnu gagna kanningunum í hinum økjunum sigur Peter Osborne, sum vísir á, at teir eru komnir til Føroya saman við BP fyri at greiða frá tí samstarvi, sum best bæði feløgini hava gjørt av skal vera í føroyskum øki.

Frammanundan arbeiða tey saman vestan fyri Hetland.

Peter Osborne sigur við Sosialin, at feløgini hava ikki skrivað undir nakran sáttmála men er samstarvið enn at meta meira sum óformelt.

Peter de Ruiter, kanningarstjóri vísir á, at hetta er einki óvanligt, tí tú sært so nógv ymisk sløg av samstarvi kring alla verðina. Tú kanst m.a. arbeiða saman við BP í einum plási fyri so at kappast í einum øðrum.

Shell hevur fyribils avtalað við BP um saman at gera nógvar av kanningunum í økinum. Hvussu nógv samstarv verður veksur so aftur um, hvussu nógv virksemi verður.

**Bæði feløgini operatørar á Atlantsmótinum**

BP og Shell eru so mikið stór oljufeløg, at tey vilja bæði vera operatørar í øllum nýggjum og stórum øki sum tí føroyska. Men hetta kann so ikki gerast í einum og sama blokki. Men til her í einum øki at samvinna við t.d. at lata annað felagið vera operatørur í einum blokki og hitt í einum øðrum.

BP og Shell hava skipað sítt samstarv vestan fyri Hetland á tann hátt, at meðan BP er operatørur í sunnara partinum av økinum er Shell tað í tí norðara partinum.

Shell og BP umhugsa at brúka somu mannagongd í Føroyum sum tey brúka vestan fyri Hetland tvs. at bæði virka sum operatørar í økinum men ikki í somu blokkum. Hetta liggur tó ikki heilt fast enn, tí tað eru enn „very early days", sigur Peter de Ruiter.

Men hvussu ber tað so til, at hesir báðir oljugigantarnir samvinna í einum parti av heiminum fyri so at vera dyggastu kappingarneytar í einum øðrum.

Peter de Ruiter: -Tá talan er um „upstream" vinnu tvs. tá arbeitt verður við at fáa olju og gass upp úr undirgrundini, v.s.v. leiting, tá arbeiða vit nógv saman. Meðan tað er øðrvísi í „downstream" vinnuni, har tað snýr seg um framleiðslu og sølu av olju og gassi.

Stór risiko er altíð knýtt at leiting, og tá kann tað koma væl við hjá feløgum at arbeiða saman fyri harvið at býta risikoina men eisini fyri at njóta gott av royndunum og førleikanum hjá hvørjum øðrum.

**Brúka royndir frá mexikanska flógvanum í arbeiðinum við Føroyar**

Shell og BP eru von við at samarbeiða á djúpum vatni, eitt nú í mexikanska flógvanum, har tað verður leitað og framleitt á meira enn 1000 metra dýpi.

-Tað er heilt náttúrligt, at vit víðka hetta samstarvið til eisini at fevna um djúpa vatnið kring Føroyar sigur Peter de Ruiter. Í nógvum førum kunnu teir brúka royndirnar frá mexikanska flógvanum á føroyskum øki.

**Shell ikki ov stórt til føroyska samfelagið**

Oljufeløgini Shell og BP eru ávikavist heimsins største og triðstørsta oljufelag. Vit spurdu Peter Osborne, um ikki hesir báðir oljugigantarnir eru ov stórir og ov ógvusligir fyri eitt



*F.v. Peter de Ruiter, kanningarstjóri hjá Shell í bretskum øki, Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá Shell í Føroyum og Peter Osborne, leiðari fyri leitingini eftir olju og gassi á Atlantsmótinum. Mynd Jan*

